Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

Klaksvíkar Býráð

Dagfesting:	21.12.2021 kl. 17:30
Málnr.:	21/01365 Gerðabók
Nevndarlimir:	Karl Johansen, Atli S. Justinussen, Jógvan Skorheim, Gunvá við Keldu, Oddmar á Lakjuni, Jóhanna Christiansen, Eyðstein Ó. Poulsen, Annika S. Biskopstø, Óli M. Lassen, Signhild V. Johannesen og Tummas J. Lervig
Varalimir:	Bárður J. Heinesen møtti fyri Eyðstein Ó. Poulsen
Ikki møtt:	
Onnur:	Rúni Rasmussen, kommunustjóri
Protokollførari:	Jensa Anthoniussen, fulltrúi

Málsyvirlit		
Til viðgerðar		
185/21	21/02130-5	Býráðslimi berst frá at møta á býráðsfundi 21. des. 2021 - Eyðstein Ó. Poulsen
186/21	21/01917-2	Áseting av føstu almennu býráðsfundunum fyri árið 2022
187/21	21/01575-1	Rabarbugarður frábýtast matr.nr. 27a á Trøllanesi
188/21	21/01578-2	Frábýti av lendi undir seyðahúsi á matr.nr. 40a í Árnafirði
189/21	21/01579-2	Umsókn um sundurbýti - matr.nr. 806b
190/21	21/01673-5	Umsókn um marknaumskipan - matr.nr. 253an og 253am
191/21	21/01674-4	Búnaðarstovan um part av matr.nr. 90 í Svínoy
192/21	21/01829-2	Marknaumskipan uttangarðs á Norðoyri - matr.nr. 18 og 13
193/21	21/01883-2	Umsókn um sundurbýti í eigaraíbúðir
194/21	21/01713-1	Byggisamtyktarbroyting fyri neystaøkið D36, Norðoyri
195/21	21/01884-6	Umsókn um rakstrarstuðul fyri ár 2022 - Gloria
196/21	21/02045-1	Flyting millum kontur, Ung í Arbeiði / Trivnaðardeildin – *flyting millum høvuðskontubólkar, fyrra viðgerð*
197/21	21/01947-1	Útvegan av gróti á útoyggj
198/21	21/01961-2	Felagskommunal reglugerð um óljóð frá skipum setast í gildi
199/21	21/01805-3	Umsókn um endurnýggjan av leigusáttmála - MC Grill
200/21	21/01954-1	Grønt øki við Másheygg
201/21	21/01954-2	Leikvøllurin á Másheyggi - *flyting millum kontur, fyrra viðgerð*

202/21	21/01278-1	Kloakk-/spillivatnsætlan, íløga 2021 (Heygavegur v.m.) – *eykajáttan, seinna viðgerð*
203/21	21/01281-3	Lastbilur við krana til kloakktoymið, fígging í 2021– *flyting millum høvuðskontur, seinna viðgerð*
204/21	21/01806-1	"Sproyta" til tilbúgvingina – *flyting millum høvuðskontur, seinna viðgerð*

Til viðgerðar

185/21
21/02130-5 Býráðslimi berst frá at møta á býráðsfundi 21. des. 2021 - Eyðstein Ó. Poulsen

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Klaksvíkar Býráð	21.12.2021	185/21

21/02130-5 Býráðslimi berst frá at møta á býráðsfundi 21. des. 2021 - Eyðstein Ó. Poulsen

Frágreiðing um málið:
Eyðstein Ó. Poulsen, býráðslimur valdur fyri Fólkaflokkin, hevur boðað frá, at hann hevur forfall til býráðsfundin 21. des. 2021. Næstvaldi og triðivaldi á listanum hava eisini forfall, og tí er heitt á Bárð J. Heinesen, ið er fjórðvaldi tiltakslimur á listanum, um at møta til fundin.

Lógargrundarlag:
Kommunustýrislógin, § 18, stk. 1 og stk. 3.

Fíggjarligar avleiðingar:
Fundarsamsýning til tiltakslimin, um býráðið avger at lata hann taka sætið í býráðnum til fundin.

Tilmæli:
Mælt verður býráðnum til at taka støðu til áheitanina um at innkalla tiltakslim fyri Eyðstein Ó. Poulsen.

Klaksvíkar Býráð 21. december 2021:
Einmælt samtykt at lata Bárð J. Heinesen taka sæti til býráðsfundin.

Til viðgerðar

186/21
21/01917-2 Áseting av føstu almennu býráðsfundunum fyri árið 2022

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Klaksvíkar Býráð	21.12.2021	186/21

21/01917-2 Áseting av føstu almennu býráðsfundunum fyri árið 2022

Frágreiðing um málið:
Býráðið skal við ársbyrjan almannakunngera, nær og hvar vanligir kommunustýrisfundir verða hildnir.

Hesir fundardagar eru í uppskoti til býráðsfundirnar í 2022:

27. januar	30. juni
24. februar	29. september
24. mars	27. oktober
28. apríl	24. november
25. mai	15. desember

Fundir Klaksvíkar býráðs verða vanliga hildnir hósdag í býráðshøllini, Nólsoyar Pálsgøta 32, Klaksvík; uppskotni fundurin í mai er tó ein mikudag.

Lógargrundarlag:
Kommunustýrislógin

> ***§ 13.*** *Kommunustýrið hevur vanliga fund eina ferð um mánaðin. ... Almannakunngjørt skal verða við ársbyrjan, nær og hvar vanligir kommunustýrisfundir verða hildnir.*

Tilmæli:
Mælt verður býráðnum til at taka støðu til uppskotnu fundardagarnar.

Klaksvíkar Býráð 21. desember 2021:
Einmælt samtykt at taka undir við teimum í tilmælinum, dagf. 7. des. 2021, uppskotnu fundardøgunum fyri 2022.

187/21
21/01575-1 Rabarbugarður frábýtast matr.nr. 27a á Trøllanesi

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Trøllanesnevndin	01.12.2021	13/21
2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	06.12.2021	166/21
3 Klaksvíkar Býráð	21.12.2021	187/21

21/01575-1 Rabarbugarður frábýtast matr.nr. 27a á Trøllanesi

Frágreiðing um málið:
Umhvørvisstovan biður um býráðsins ummæli til, at “rabarbugarðurin” á Fløtum niðan móti landsvegnum á Trøllanesi verður frábýttur matr.nr. 27a.

Tekniska umsiting hevur hesar viðmerkingar til málið:
Byggisamtyktarliga liggur umrøddi rabarbugarður/flogfenaðøkið í økisparti G – landbúnaður.
Staðseting framvið landsvegi.

Lógargrundarlag:
Løgtingslóg nr. 64 frá 11. des. 1962 um matrikulering og sundurbýti.

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar – kommunan bert ummælandi partur

Tilmæli:
Vísandi til nýtsluna av økinum í mun til byggisamtyktarligu ásetingarnar hevur tekniska umsiting ongar viðmerkingar til umsóknina, - tó verður í samband við stødd av økinum víst til galdandi lóggávu fyri sundurbýti av landbúnaðarjørð, samstundis sum víst verður á, at staðsetingin framvið landsvegi krevur ummæli frá Landsverk.

Trøllanesnevndin 1. desember 2021:
Nevndin heldur at tað er óheppið at frámatrikkulera økið, og mælir tí til langtíðarleigu í staðin.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 6. desember 2021:
Nevndin tekur undir við Trøllanesnevndini 1. des. 2021.

Klaksvíkar Býráð 21. desember 2021:
Tilmælið frá UBN 6. des. 2021 einmælt samtykt.

188/21
21/01578-2 Frábýti av lendi undir seyðahúsi á matr.nr. 40a í Árnafirði

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Árnafjarðarnevndin	23.11.2021	15/21
2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	06.12.2021	167/21
3 Klaksvíkar Býráð	21.12.2021	188/21

21/01578-2 Frábýti av lendi undir seyðahúsi á matr.nr. 40a í Árnafirði

Frágreiðing um málið:
Vísst verður til

- umsókn dagf. 21. mai 2021, har Búnaðarstovan søkir Umhvørvisstovuna um frábýti av lendi undir gomlum seyðahúsi á matr.nr. 40a í Árnfirði og
- skriv dagf. 26. okt. 2021 frá Umhvørvisstovuni til Klaksvíkar kommunu, har biðið verður um kommununnar ummæli til nevnda sundurbýti.

Tekniska umsiting hevur hesar viðmerkingar til málið:

- Byggisamtyktarliga er talan um lendi í økisparti G, sum er landbúnaðarøki.
- Lendið liggur framvið landsvegi

Lógargrundarlag:
Matrikullógin

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar – kommunan bert ummælandi

Tilmæli:
Tekniska umsiting hevur onki at viðmerkja til umsókta sundurbýti.

Árnafjarðarnevndin 23. november 2021:
Niclas F. Justinussen luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 16-11-2021.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 6. desember 2021:
Nevndin tekur undir við Árnafjarðarnevndini 23. nov. 2021.

Klaksvíkar Býráð 21. desember 2021:
Atli S. Justinussen luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.
Tilmælið frá UBN 6. des. 2021 einmælt samtykt.

189/21
21/01579-2 Umsókn um sundurbýti - matr.nr. 806b

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	06.12.2021	168/21
2 Klaksvíkar Býráð	21.12.2021	189/21

21/01579-2 Umsókn um sundurbýti - matr.nr. 806b

Frágreiðing um málið:
Umhvørvisstovan biður um kommununnar ummæli til umsókn um sundurbýti av matr.nr. 806b í Klaksvík

Tekniska umsiting hevur hesar viðmerkingar:
Byggisamtyktarliga er talan um økispart A8, har minsta mark vanlig grundøki er sett til 300 m^2.

Matr.nr. 806b liggur í tveimum pørtum - ein hvørjumegin vegin Eystan Garð. Samlaða víddin er 359 m^2 – 222 m^2 omanfyri vegin og 137 m^2 niðanfyri vegin.

Vísandi til áseting fyri minsta mark grundøki í byggisamtyktini er ikki heimild fyri at viðmæla sundurbýti í hvør sín lut. Er talan hinvegin um sundurbýti til samanlegging við annan eigindóm, er onki til hindurs fyri sundurbýti

Lógargrundarlag:
Matrikullógin
Almenna Byggisamtyktin

Fíggjarligar avleiðingar:
Kommunan bert ummælandi

Tilmæli:
Mælt verður til at svara Umhvørvisstovuni sum víst omanfyri.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 6. desember 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 26-11-2021.

Klaksvíkar Býráð 21. desember 2021:
Tilmælið frá UBN 6. des. 2021 einmælt samtykt.

190/21
21/01673-5 Umsókn um marknaumskipan - matr.nr. 253an og 253am

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	06.12.2021	169/21
2 Klaksvíkar Býráð	21.12.2021	190/21

21/01673-5 Umsókn um marknaumskipan - matr.nr. 253an og 253am

Frágreiðing um málið:
Umhvørvisstovan biður um býráðsins ummæli til, at 20 m^2 verða fluttir frá matr.nr. 253an til 253am.



Lógargrundarlag:
Matrikulógin
Alemmna Byggisamtyktin

Fíggjarligar avleiðingar:
Kommunan bert ummælandi

Tilmæli:
Tekniska umsiting mælir til at viðmæla umsóknini

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 6. desember 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 26-11-2021.

Klaksvíkar Býráð 21. desember 2021:
Tilmælið frá UBN 6. des. 2021 einmælt samtykt.

191/21
21/01674-4 Búnaðarstovan um part av matr.nr. 90 í Svínoy

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Svínoyarnevndin	01.12.2021	23/21
2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	06.12.2021	170/21
3 Klaksvíkar Býráð	21.12.2021	191/21

21/01674-4 Búnaðarstovan um part av matr.nr. 90 í Svínoy

Frágreiðing um málið:
Víst verður til skriv frá Búnaðarstovuni dagf. 3. nov. 2021, har biðið verður um kommununnar ummæli til, at matr.nr. 40 fær til keyps uml. 64 m^2 av matr.nr. 90a í Svínoy.

Tekniska umsiting hevur hesar viðmerkingar:
Talan er um part av sama øki, sum borgari hevur søkt um at fáa til keyps frá Búnaðarstovuni. Tað málið varð viðgjørt í Svínoyarnevndini 7. febr. og á býráðsfundi 28. febr. 2019 (sí viðheftu samtykt).

Lógargrundarlag:
Matrikullógin
Løgtingslóg um landsjørð

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar – kommunan bert ummælandi

Tilmæli:

Tekniska umsiting mælir til at halda seg til býráðssamtyktina frá 28. febr. 2019 og lata upp til eigaran (Búnaðarstovuna) at gera av, um lendið verður býtt millum áhugaðu keypararnar, tó við tí viðmerking, at eftirverandi partur av aktuella lutinum av matr.nr. 90a (Heimi í Bø 6) ikki fer niðurum 300 m^2 – hetta sambært minsta mark grundøki í byggisamtyktaruppskotinum.

Svínoyarnevndin 1. desember 2021:
Nevndin tekur undir við tilmæli frá teknisku fyrisiting 16-11-2021.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 6. desember 2021:
Nevndin tekur undir við Svínoyarnevndini 1. des. 2021.

Klaksvíkar Býráð 21. desember 2021:
Tilmælið frá UBN 6. des. 2021 einmælt samtykt.

192/21
21/01829-2 Marknaumskipan uttangarðs á Norðoyri - matr.nr. 18 og 13

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Norðoyrarnevndin	23.11.2021	12/21
2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	06.12.2021	171/21
3 Klaksvíkar Býráð	21.12.2021	192/21

21/01829-2 Marknaumskipan uttangarð á Norðoyri - matr.nr. 18 og 13

Frágreiðing um málið:
Umhvørvisstovan biður um kommununnar ummæli til marknaumskipan uttangarðs millum matr.nr. 18 og 13 á Norðoyri.

Tekniska umsiting hevur hesar viðmerkingar:

- Matr.nr. 18 (fyritøka) eigur í dag 3 gl. uttangarðs
- Matr.nr. 13 (borgari) eigur í dag 1 gl uttangarðs

Eftir umskipanina hoyrir ongin uttangarðsjørð til matr.nr. 18 á Norðoyri

Lógargrundarlag:
Matrikullógin

Fíggjarligar avleiðingar:
Ognar – kommunan bert ummælandi

Tilmæli:
Tekniska umsiting mælir til at viðmæla umsóknini

Norðoyrarnevndin 23. november 2021:
Nevndin tekur undir við tilmæli frá TU dagf. 16-11-2021.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 6. desember 2021:
Nevndin tekur undir við Norðoyrarnevndini 23. nov. 2021.

Klaksvíkar Býráð 21. desember 2021:
Tilmælið frá UBN 6. des. 2021 einmælt samtykt.

193/21
21/01883-2 Umsókn um sundurbýti í eigaraíbúðir

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	06.12.2021	172/21
2 Klaksvíkar Býráð	21.12.2021	193/21

21/01883-2 Umsókn um sundurbýti í eigaraíbúðir

Frágreiðing um málið:
Víst verður til viðheftu umsókn um sundurbýti til eigaraíbúðir á matr.nr. 632l og 797f

Tekniska umsiting hevur hesar viðmerkingar:
Byggisamtyktarliga er talan um
- øki, útlagt til m.a íbúðarendamál
- loyvi er til samanbygda lága bygging
- grundøkjavídd min 200 m^2 (pr. íbúð)

Eigarin og Klaksvíkar kommuna hava umsókn um makaskifti millum matr.nr. 632l og 437c liggjandi hjá Umhvørvistovuni, sum ikki er avgreidd enn. Aktuella umsóknin er í tráð við og í framhaldi av hesari.

Lógargrundarlag:
Matrikullógin
Almenna byggisamtyktin

Fíggjarligar avleiðingar:
Kommunan bert ummælandi partur

Tilmæli:
Tekniska Umsiting mælir til at viðmæla umsóknini treytað av, at
- áløgd brunakrøv verða yvirhildin og
- grundøkjavídd pr. íbúð heldur seg innanfyri ásetingarnar í almennu byggisamtyktini.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 6. desember 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 26-11-2021.

Klaksvíkar Býráð 21. desember 2021:
Tilmælið frá UBN 6. des. 2021 einmælt samtykt.

194/21
21/01713-1 Byggisamtyktarbroyting fyri neystaøkið D36, Norðoyri

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Norðoyrarnevndin	23.11.2021	11/21
2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	06.12.2021	163/21
3 Klaksvíkar Býráð	21.12.2021	194/21

21/01713-1 Byggisamtyktarbroyting fyri neystaøkið D36, Norðoyri

Frágreiðing um málið:
Eftir øktan áhuga fyri neystabygging á Norðoyri og møguliga kommunala neystaætlan leggur fyrisitingin upp til, at broyting verður framd í byggisamtyktini fyri D36.



D36 - Norðoyri

Økismarkið verður tað sama, tó fara broytingar fram í ásetingunum, t.d. at kravd grundøkjavídd verður staðfest, mest loyvd byggivídd, mest loyvd bygningshædd og snið. Sí *D36 - Galdandi* og *D36 - Broytingaruppskot fyri nærri lýsing.*

Vinaliga sí samtykt Havna- og vinnunevndin 05.10.21.

Lógargrundarlag:
Løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir v.m.

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar

Tilmæli:
Mælt verður til at fremja byggisamtyktarbroytingina.

Norðoyrarnevndin 23. november 2021:
Ein meiriluti í nevndini, Karl H. Johansen, Tummas J. Lervig, Jan H. Askham og Jana Skoradal tekur undir við byggisamtyktarbroytingini. Ein minniluti í nevndini, Hjørdis Hávarsá, tekur undir við byggisamtyktarbroytingini, tó við tí treyt, at neystabygging ikki verður frá matr.nr. 33 og norðureftir í D36-økinum.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 6. desember 2021:
Nevndin tekur undir við meirilutanum í Norðoyrarnevndini 23. nov. 2021.

Klaksvíkar Býráð 21. desember 2021:
Tilmælið frá UBN 6. des. 2021 einmælt samtykt.

195/21
21/01884-6 Umsókn um rakstrarstuðul fyri ár 2022 - Gloria

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Fíggjarnevndin	20.12.2021	154/21
2 Klaksvíkar Býráð	21.12.2021	195/21

21/01884-6 Umsókn um rakstrarstuðul fyri ár 2022 - Gloria

Frágreiðing um málið:
Víst verður til tilmælið í hesum máli, dagfest 27. november 2021, sum er til viðgerðar hetta fundarumfarið, har mælt verður til – í samráð við borgarstjóran, sum eisini er formaður í stýrinum fyri NBH – at skerja játtan kommununnar til NBH við 300.000 kr. og samstundis hækka játtan kommununnar til Umsorganarheimið Gloria við somu upphædd.

Málið hevur síðan verið fyri í Trivnaðarnevndin Eldri & Bústaðir og Fíggjarnevndini, og stýrið fyri NBH hevur eisini samtykt onkrar sparingar í hesum sambandi. Undir viðgerðini er komin fram ein ivi um, hvussu henda tillaging av fíggjarætlan býráðsins best verður framd, og tí hevur fíggjarnevndin útsett hetta málið til ein eykafund, sum verður 20. desember 2021.

Lógargrundarlag:
-

Fíggjarligar avleiðingar:
Vísandi til omanfyristandandi og til samskifti við borgarstjóran, kommunustjóran og roknskaparleiðaran á fundi í dag, verður mælt til hesa tillagaðu flyting millum kontur í fíggjarætlan Klaksvíkar kommunu 2022:

Rak.stað nr.	Rakstrarstað	Játtan 2021	Játtan 2022	*Broyting 2022*	Dagført 2022
02211270210	Stuðul innan almanna-& heilsumál	1.850.000 kr.	1.550.000 kr.	*+250.000 kr.*	1.800.000 kr. *)
	Kl.kom. Gjøld til NBH (Eldrasamstarv)	67.901.000 kr.	70.944.241 kr.	*–250.000 kr.*	70.694.241 kr.
				0 kr.	

**) Partur av hasum 1.800.000 kr. er ein stuðulskonta á 50.000 kr. "Stuðul innan almanna-& heilsumál", tvs. Gloria fær 1.750.000 kr.*

Talan er um eina fyri kommununa útreiðsluneutrala broyting av fíggjarætlanini fyri 2022.

Tilmæli:
Vísandi til omanfyristandandi verður mælt til: *at kommunala játtanin til Gloria á fíggjarætlanaruppskoti býráðsins fyri 2022 eftir omanfyri nevnda leisti verður hækkað við 250.000 kr., so hon kemur upp á 1,75 mió. kr., og *at formligar samráðingar verða tiknar upp við landsstýriskvinnuna við tí fyri eyga, at landið – stigvíst yvir nøkur ár frá og við 2023 – yvirtekur kommunustuðulin til Gloria, eins og landið hevur gjørt ísv. Herbergið í Havn.

Fíggjarnevndin 20. desember 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 15-12-2021.

Klaksvíkar Býráð 21. desember 2021:
Tilmælið frá FíN 20. des. 2021 einmælt samtykt.

196/21
21/02045-1 Flyting millum kontur, Ung í Arbeiði / Trivnaðardeildin – *flyting millum høvuðskontubólkar, fyrra viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Trivnaðarnevndin Børn og Ung	07.12.2021	63/21
2 Fíggjarnevndin	14.12.2021	150/21
3 Klaksvíkar Býráð	21.12.2021	196/21

21/02045-1 Flyting millum kontur – Ung í Arbeiði / Trivnaðardeildin

Frágreiðing um málið:
Tørvur er á at gera eina dagføring av lønaravsetingini til samskiparan á trivnaðarøkinum í fíggjarætlanini fyri 2022 – tí hetta tilmæli:

Fíggjarligar avleiðingar:
Mælt verður til, at niðanfyri standandi flyting millum kontu verður gjørt í fíggjarætlanini fyri árið 2022:

Rakstrar-stað nr.	Rakstrar-stað	Standard-kt.nr.	Standard-konta	Játtan 2022	Broyting 2022	Dagførd játtan
03241270045	Ung í arbeiði	111000	Løn, mánaðar-lønt	385.000 kr.	–385.000 kr.	0 kr.
	Trivnaðar-deild	111000	Løn, mánaðar-lønt	0 kr.	+385.000 kr.	385.000 kr.
					0 kr.	

Tilmæli:
Mælt verður til, at 385.000 kr. í fíggjarætlanini fyri 2022 verða fluttar millum kontur frá rakstrarstaðnum Ung í Arbeiði til rakstrarstaðið Trivnaðardeild eftir omanfyri útgreinaða leisti.

Trivnaðarnevndin Børn og Ung 7. desember 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagfest 29-11-2021.

Fíggjarnevndin 14. desember 2021:
Nevndin tekur undir við B&U 07-12-2021, og at hildið verður fram við leistinum, Ung í Arbeiði er bygt á seinnu árini.

Klaksvíkar Býráð 21. desember 2021:
Tilmælið frá FíN 20. des. 2021 einmælt samtykt.

197/21
21/01947-1 Útvegan av gróti á útoyggj

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	06.12.2021	K-59/21
2 Havna- og Vinnunevndin	08.12.2021	81/21
3 Tekniska Nevnd	08.12.2021	K-37/21
4 Fíggjarnevndin	14.12.2021	152/21
5 Klaksvíkar Býráð	21.12.2021	197/21

21/01947-1 Útvegan av gróti á útoyggj

Frágreiðing um málið:
Borgarstjórin hevur havt málið um gróttilfar á útoyggj (Kalsoy og Svínoy) til umrøðu og viðgerðar á ymiskum fundum, og vísast kann eisini á í hesum sambandi, at kommunan hevur mál til viðgerðar, har søkt er um stuðul til privatar verkætlanir á útoyggj. Onkur verkætlan hevur fingið játtaðan stuðul, og aðrar liggja, sum ikki eru endaliga viðgjørdar.

Nú verður málið lagt fyri HaVN. Spurningurin er, um kommunan skal arbeiða víðari við at útvega gróttilfar á útoyggj við at spreingja eftir gróti á staðnum.

Viðv. Svínoy:
Kommunan hevur í mong ár havt gróttilfar liggjandi frá bátahylinum í Glógvansurð, men nú er einki eftir. Grótbrot er í Svínoy (Djúpidalur), men eingin avtala er um framhald av gróttøku.

Fyrrverandi nevndarlimur í Svínoyarnevndini, sum eisini er festari, hevur á fundi í staðbundnu nevndini víst á, at góður møguleiki er fyri at taka grót nakað sunnanfyri smiðjubygningin hjá kommununi í Svínoy. Plássið er úti á Ketli.
Nevndu pláss í Svínoy krevja vegabreiðkan, og tí er kanska neyðugt við einum øðrum alternativi.

Seinastu árini hava givið eina greiða ábending um, at neyðugt er at hava gróttilfar tøkt í Svínoy.

Viðv. Kalsoy:
Landsverk hevur, ella hevur havt, eitt grótbrot norðuri á Dalsenni, sum er nakað norðanfyri Húsar. Borgarstjórin hevur samskift við Landsverk um málið, og hevur stjórin fyri Landsverk upplýst, at teirra vegna er einki í vegin fyri, at kommunan spreingir eftir meira gróttilfari.
Sum kunnugt arbeiðir kommunan og privatir við ymiskum ætlanum í Kalsoy, og tí verður tørvur á at hava gróttilfar tøkt í Kalsoy.

Kommunan arbeiðir eisini við møguleikanum fyri, at grótbrotið í Kalsoy verður brúkt til mold- og eyrmóttøku, og ein ætlan er eisini um, at grótbrotið skal nýtast til bingjupláss. Hetta skuldi givið góðan møguleika fyri, at grótbrotið í Kalsoy verður fríðkað og endaliga frágingið.

Um farið verður víðari við málinum, verður neyðugt:

- at greið avtala verður gjørd millum lendisánara og kommununa
- at greið avtala verður gjørd millum Landsverk og kommununa
- at málið verður loyst innan økið hjá HaVN, og at grót- og tilfarssølan stendur fyri málinum saman við staðundnum fólki
- at nøktandi maskinamboð eru tøk til verkætlanina – møgulig leiga
- at friðingarmyndugleikin góðtekur ætlanina
- at allar viðkomandi nevndir og býráð taka undir við málinum.

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin

Fíggjarligar avleiðingar:
Málið ætlast avgreitt innan fíggjarkarmin fyri 2021/2022 og møguliga 2023, soleiðis at skilja at brúktur peningur til avgrevstur og spreinging skal koma innaftur við sølu av gróttilfari.

Vanliga roknistykkið hjá grót- og tilfarssøluni var, at tað kostaði einar kr. 15,- pr. tons at spreingja eftir gróti, men á útoyggj er kostnaðurin hægri, kanska kr. 30,- pr. tons ella meira. Sølukostnaðurin er kr. 88,- pr. tons íroknað mvg. Helst verður neyðugt at áseta ein hægri kostnað fyri tonsið á útoyggj.

Tilmæli:
Málið verður við hesum sent UBN og TN til kunningar, og til HaVN til viðgerðar/støðutakan, um fyrisitingin skal arbeiða víðari við málinum.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 6. desember 2021:
Málið verið til kunningar.

Havna- og Vinnunevndin 8. desember 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum dagf. 28-11-2021, og at grót- og tilfarssølan stendur fyri arbeiðinum.

Tekniska Nevnd 8. desember 2021:
Málið verið til kunningar.

Fíggjarnevndin 14. desember 2021:
Nevndin tekur undir við HaVN 08-12-2021.

Klaksvíkar Býráð 21. desember 2021:
Tilmælið frá FíN 14. des. 2021 einmælt samtykt.

198/21
21/01961-2 Felagskommunal reglugerð um óljóð frá skipum setast í gildi

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Havna- og Vinnunevndin	08.12.2021	74/21
2 Fíggjarnevndin	14.12.2021	146/21
3 Klaksvíkar Býráð	21.12.2021	198/21

21/01961-2 Felagskommunal reglugerð um óljóð frá skipum setast í gildi

Frágreiðing um málið:
Endamálið við felagskommunalu reglugerðini um óljóð á skipum er at áseta felags reglur um lágfrekvent motorljóð og um óneyðugan larm frá skipum, sum liggja við bryggju í kommunalari havn.

Reglugerðin byggir á úrslitini frá tilsamans 273 ljóðmátingum í havnum, í bústaðarøkjum og inni í bústøðum kring landið. Mátingarnar, sum fóru fram á sumri og á heysti 2021, eru framdar eftir altjóða standardi, og eru síðani viðgjørdar við einari rød av greiningum og hagfrøðiligum útrokningum. Staðfest varð í hesum arbeiði, at tað er rættast at máta ljóðið 25 metrar frá skipssíðuni (og ikki t.d. inni í einstøkum húsum).

Eftir samskifti millum kommunal umboð og landsins umhvørvismyndugleika eru felags markvirði ásett fyri lágfrekventum motorljóði. Markvirðini verða sett í verk 1. januar 2022 og eru stigvíst lækkandi komandi trý árini.

Felags skráseting fyri brot á reglugerðina verður gjørd, og í evsta føri kunnu skip fáa boð um, at tey ikki sleppa í nakra føroyska havn. Reglugerðin verður umsitin í felag millum havnirnar og havnarmyndugleikarnir skulu tí halda seg til mátingar o.a. hvør hjá øðrum. Tað merkir millum annað, at verður eitt skip víst úr einari havn vegna ov høgt motorljóð, so sleppur skipið ikki inn í aðra havn, uttan so at grundleggjandi fortreytir eru broyttar.

Fyri Kommunufelagið hevur havnarnetverkið staðið fyri arbeiðinum við reglugerðini. Í netverkinum eru umboð fyri allar stóru (ídnaðar)havnirnar í Føroyum og skrivstovuna hjá Kommunufelagnum.

Fyrsta eftirmetingin av reglugerðini verður í seinasta lagi í 2023.

Í sambandi við arbeiðið at áseta markvirði varð harumframt semja í havnarnetverkinum um at áseta ein felags leist fyri at basa óneyðugum larmi frá skipum og skipavirksemi í kommunalum havnum. Reglugerðin hevur tí eisini ásetingar um hetta.

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin

Fíggjarligar avleiðingar:
Ávísar fíggjarligar avleiðingar eru í samband við keyp av ljóðmátarum og ávís arbeiðsorka skal eisini leggjast í at gera ljóðkanningar.

Tilmæli:
Mælt verður til at:

1. seta felagskommunalu reglugerðina á skrá á fyrstkomandi býráðsfundi, og at

2. samtykkja reglugerðina í (innihaldsliga) óbroyttum líki.

Havna- og Vinnunevndin 8. desember 2021:
Nevndin tekur undir við felagsreglugerðini, men reglugerðin er ikki galdandi fyri havnaløg í óbygdum økjum (og ikki ávirka bústaðarøki).

Fíggjarnevndin 14. desember 2021:
Nevndin tekur undir við HaVN 08-12-2021.

Klaksvíkar Býráð 21. desember 2021:
Tilmælið frá FíN 14. des. 2021 einmælt samtykt.

199/21
21/01805-3 Umsókn um endurnýggjan av leigusáttmála - MC Grill

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	06.12.2021	K-60/21
2 Mentanarnevndin	07.12.2021	82/21
3 Havna- og Vinnunevndin	08.12.2021	78/21
4 Klaksvíkar Býráð	21.12.2021	199/21

21/01805-3 Umsókn um endurnýggjan av leigusáttmála - McGrill

Frágreiðing um málið:
Í skrivi frá umsitingini, dagf. 29-11-2021, verður greitt nærri frá málinum.

Umsøkjarin hevur sent kommununi áheitan um at leingja leigusáttmálan, sum er fyri grillini, sum er á matr. nr. 163a, havnaøki, beint sunnanfyri Klaksvíkshandilin. Ynskið er at endurnýggja sáttmálan í 2 ár, og greitt verður frá, at henda tíðin skal brúkast til at gera seg til reiðar at flyta grillina og dagføra hana til um 2 ár.

Sambært kommunustýrisskipanini er tað Havna- og vinnunevndin, sum fyrisitur vinnuøkir, sum liggja upp at havnaøki og hava tilknýti til bryggju, meðan fíggjarnevndin fyrisitur mál, sum snúgva seg um burturleigu av ognum í minni enn 5 ár.

Í hesum føri er tó greitt, at umrødda leigumálið varð uppsagt í september og gongur út fyrsta desember. Hetta var fyri í UBN, MeN og HaVN sum kunningarmál í september-umfarinum, eftir at uppsøgnin varð send.

Afturat hesum er greitt, at fyrisitingin síðan tíðliga í 2020 hevur havt samskifti við umsøkjaran um eina møguliga flyting av hansara virksemi heim í økið á matr. nr. 1645a, og at 23. juni 2020 var skriv sent umsøkjaranum við nøkrum treytum fyri flytingini.

28. august 2020 var fundur millum fyrisitingina og umsøkjaran, har umsøkjarin greiddi frá, at hann ivaðist, um hann skuldi flyta grillina. Tó spurdi hann, um tað ber til at gera ein sáttmála á 29 ár í økinum við Blikksmiðjuna, og til tað varð játtandi svar givið. Á fundinum varð avtalað, at umsøkjarin skuldi umhugsa støðuna í ein mánað, og skuldi síðan venda aftur til umsitingina.

Eftir hetta var lítið samskifti í málinum, tó at kommunan av og á spurdi umsøkjarin, um nakað nýtt var at frætta í málinum.

Til kunnleika hevur undanfarna Havnanevnd og viðkomandi nevndir annars arbeitt við at umskipa økið kring Fornminnasavnið, Havnaskrivstovuni, Ídni og Faktorshúsini, har standmyndin av Elinborg Lützen stendur, so tað sambært byggisamtyktini verður eitt "Alment- ella savnsøki".

Eftir hesum uppskoti verður partur av vegnum omanfyri Fornminnasavnið tikin nakað niður og kjallarin meira frílagdur, samstundis sum ein trappa fer omanvið sunnanfyri Fornminnasavnið, júst har Grilin nú stendur.

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin

Fíggjarligar avleiðingar:
Ein smávegis mist ella økt leigu inntøka hjá Klaksvíkar kommunu.

Tilmæli:
Mælt verður til, at viðkomandi nevndirnar taka støðu til nýtsluna av lendinum sunnanfyri Klaksvíkshandilin komandi 2 árini, og harvið um umsóknin um leigusáttmála kann verða gingin á møti og skrivið frá Norðoya Fornminnasavni.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 6. desember 2021:
Málið verið til kunningar.

Mentanarnevndin 7. desember 2021:
Nevndin mælir til at uppsøgnin stendur við, at økið verður brúkt samsvarandi skitsuuppskotinum, og at vognurin er staðsettur aðrastaðni áðrenn 1. mai 2022. Tilboðið um byggibúning og leiðingar á aðrari staðseting stendur við.

Havna- og Vinnunevndin 8. desember 2021:
Vísandi til, at eigarin av grillini hevur boðað kommununi frá, at hann gavst við virkseminum og hevur vent aftur til kommununa við ynski um at halda fram í økinum í 2 ár, mælir ein meiriluti ASJ, OáL, EyÓP og TJL til, at umsøkjarin fær møguleika til at vera verandi í økinum fram til og við 31. desember 2022, so at umsøkjarin hevur møguleika at fyrireika flytingina, og at kommunan stendur við tilboðið um byggibúning og leiðingar á aðrari staðseting, umframt burturbeining av verandi skúri.

Ein minniluti ÓML tekur undir við MeN dagf. 07-12-2021.

Klaksvíkar Býráð 21. desember 2021:
Meirilutatilmælið frá HaVN 8. des. 2021 varð einmælt samtykt.

200/21
21/01954-1 Grønt øki við Másheygg

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	06.12.2021	175/21
2 Mentanarnevndin	07.12.2021	79/21
3 Fíggjarnevndin	14.12.2021	148/21
4 Klaksvíkar Býráð	21.12.2021	200/21

21/01954-1 Grønt øki við Másheygg

Frágreiðing um málið:
Umsitingin greiðir nærri frá málinum í skrivi 23. nov. 2021.

Byggingin av rennibreytini hevur gingið í seinna lagi síðan summarfrítíðina, og hetta hevur við sær, at arbeiðir, sum vóru ætlað liðug í ár, ikki vera tað fyrr enn næsta ár.
Hóast nógvar avbjóðingar er greitt, at gongst nøkurlunda eftir vild við øllum arbeiðinum, so verður verkætlanin liðug síðst í mai 2022, samstundis sum kostnaðurin av verkætlanini ikki er dýrkaður munandi, hóast byggitíðin hevur verið sera drúgv.

Tá alt verður tikið í nýtslu er eisini ætlanin, at uttanumøkið skal síggja snøgt út og í hesum sambandi er landslagsarkitektur frá MAP komin við einum uppskoti um eina betri loysn fyri uttanumøkið enn gras.

Eftir metingini hjá umsitingini er talan um eina munandi betri loysn at planta runnar og trø enn at sáa gras í skráarnar. Høvuðsorsøkirnar til hetta eru, at atkoman inn á leikvøllin á Másheyggi er munandi betri stýrd (gøturnar verða nýttar heldur enn gongd gjøgnum grasskráan), viðlíkahaldið er munandi minni (ikki neyðugt at sláa gras) og talan gerst hartil um eitt serstakt øki í landinum.

Prísurin á upprunaligu loysnini fyri uttanumøkið við grasskráum, sum er partur av verkætlanini í verandi løtu, er tilsamans smáar 1,2 mió. kr., og tá er kostnaðurin fyri grasskráar umleið 150.000 kr.

Metingin uppá samlaða arbeiðið, um henda loysnin verður vald í staðin er 2,2 mió. kr., har størsti parturin av kostnaðarvøkstrinum er mold og runnar, sum kosta útvið 1 mió. kr. tilsamans.

Umrødda økið er 2.289 m2 og tá tað er yvir 2.000 m2 er ein møguleiki at søkja um stuðul frá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum (stuðul til viðarvøkstur), og um nevndirnar taka undir við at fara eftir hesari loysnini, so sendir umsitingin umsókn um hetta sum skjótast.

Av tí, at talan er um at skipa eitt nýtt grønt býarrúm á yvir 2.000 m2 verður somuleiðis lagt upp til, at heilsunevndin og umhvørvis- og býarskipanarnevndin hava ein part í verkætlanini, samstundis sum býargartnarin verður brúktur sum ráðgevi í skipanini av verkætlanini.

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin

Fíggjarligar avleiðingar:
Mett verður, at samlaði meirkostnaðurin er umleið 1 mió. kr., og skal økið virka sum ein samlað heild komandi summar, so er neyðugt at taka støðu nú og at bíleggja runnarnar, sum skulu vaksa nakað, áðrenn teir verða settir niður.

Tilmæli:
Mælt verður til, at økið verður skipað eftir omanfyri nevndu ætlan og at heilsunevndin, umhvørvis- og býarskipanarnevndin og mentanarnevndin – saman við stuðli frá landinum – fíggja hvør sín part av nýggja grøna økinum við Másheygg.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 6. desember 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 23-11-2021, men at fíggingin verður at leggja fyri aftur.

Mentanarnevndin 7. desember 2021:
Nevndin tekur undir við UBN dagf. 06.12.2021 og mælir til, at runnarnir verða bílagdir í ár fyri verandi avseting. Restfíggingin verður at leggja fyri aftur í januar.

Fíggjarnevndin 14. desember 2021:
Nevndin tekur undir við MeN 07-12-2021.

Klaksvíkar Býráð 21. desember 2021:
Tilmælið frá FíN 14. des. 2021 einmælt samtykt.

201/21
21/01954-2 Leikvøllurin á Másheyggi - *flyting millum kontur, fyrra viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Mentanarnevndin	07.12.2021	80/21
2 Fíggjarnevndin	14.12.2021	149/21
3 Klaksvíkar Býráð	21.12.2021	201/21

21/01954-2 Leikvøllurin á Másheyggi - flyting millum kontur

Frágreiðing um málið:
Av tí at fleiri tiltøk í ár máttu avlýsast orsakað av koronu er minninýtsla á fleiri kontum og samlað á mentanarøkinum, grein 5.

Samstundis er greitt, at játtanin til byggingina av leikvøllinum á Másheyggi ikki strekkir til. Hetta kom fram í samband við fíggjarætlanarviðgerðina fyri 2022.

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin

Fíggjarligar avleiðingar:
Kr. 640.000 av summarfestivalur/sjómannadagar, kr. 230.000 av Norðoyastevna, kr. 80.000 av ym. tilboð/tiltøk mentan/frítíð, tilsaman kr. 950.000 verða fluttar til ítróttarøkið íløgur, leikvøllurin á Másheyggi (útgerð) 2022.

Tilmæli:
Mælt verður til, at nevndir og býráð taka undir við at flyta kr. 950.000 eftir omanfyri nevnda býti yvir rakstrarstøð 2021 til ítróttarøkið íløgur, leikvøllurin á Másheyggi (útgerð) 2022.

Mentanarnevndin 7. desember 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum dagf. 25-11-2021.

Fíggjarnevndin 14. desember 2021:
Nevndin tekur undir við MeN 07-12-2021.

Klaksvíkar Býráð 21. desember 2021:
Tilmælið frá FíN 14. des. 2021 einmælt samtykt.

202/21
21/01278-1 Kloakk-/spillivatnsætlan, íløga 2021 (Heygavegur v.m.) – *eykajáttan, seinna viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	08.11.2021	160/21
2 Tekniska Nevnd	10.11.2021	80/21
3 Fíggjarnevndin	16.11.2021	141/21
4 Klaksvíkar Býráð	18.11.2021	176/21
5 Klaksvíkar Býráð	21.12.2021	202/21

21/01278-1 Kloakk-/spillivatnsætlan - íløga 2021 (Heygavegur v.m.)

Frágreiðing um málið:
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum 18. nov. 2021.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 8. november 2021:
Nevndin tekur undir við, at 1 mió.kr. verða játtaðar til *kloakkir íløga* av *tøkum peningi*. Nevndin ynskir at síggja eitt yvirlit yvir, hvørji arbeiðir eru avgreidd, og hvørji eru eftir (ísv. Heygaveg) sum kunning komandi nevndarumfar.

Tekniska Nevnd 10. november 2021:
Nevndin tekur undir við UBN 08-11-2021.

Fíggjarnevndin 16. november 2021:
Nevndin tekur undir við TN 10-11-2021.

Klaksvíkar Býráð 18. november 2021:
Tilmælið frá FíN 16-11-2021 einmælt samtykt.

Klaksvíkar Býráð 21. desember 2021:
Tilmælið frá BýR 18. nov. 2021 einmælt samtykt við seinnu viðgerð.

203/21
21/01281-3 Lastbilur við krana til kloakktoymið, fígging í 2021 – *flyting millum høvuðskontur, seinna viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Fíggjarnevndin	16.11.2021	140/21
2 Klaksvíkar Býráð	18.11.2021	177/21
3 Klaksvíkar Býráð	21.12.2021	203/21

21/01281-3 Lastbilur við krana til kloakktoymið - fígging í 2021

Frágreiðing um málið:
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum 18. nov. 2021.

Fíggjarnevndin 16. november 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 12-11-2021.

Klaksvíkar Býráð 18. november 2021:
Tilmælið frá FíN 16-11-2021 einmælt samtykt.

Klaksvíkar Býráð 21. desember 2021:
Tilmælið frá BýR 18. nov. 2021 einmælt samtykt við seinnu viðgerð.

204/21
21/01806-1 "Sproyta" til tilbúgvingina – *flyting millum høvuðskontur, seinna viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Fíggjarnevndin	16.11.2021	144/21
2 Klaksvíkar Býráð	18.11.2021	175/21
3 Klaksvíkar Býráð	21.12.2021	204/21

21/01806-1 "Sproyta" til tilbúgvingina

Frágreiðing um málið:
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum 18. nov. 2021

Fíggjarnevndin 16. november 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 12-11-2021.

Klaksvíkar Býráð 18. november 2021:
Tilmælið frá FíN 16-11-2021 einmælt samtykt.

Klaksvíkar Býráð 21. desember 2021:
Tilmælið frá BýR 18. nov. 2021 einmælt samtykt við seinnu viðgerð.